




**OPEL VECTRA, TURBO-DIESEL**
Árg aug. 1998, Km 119.000. Kr. 116.000 – El-rútar, el-spegl, hita í setrunum, CD, fjarstýrt sentrallás. Kr 96.000 uttan bil í býti.



**VOLVO 440, 1,8**
Árg 1996, Km 76.000. Kr. 89.000 – el-rútar, el-spegl, hita í setrunum, VOLVO sportfelgur, fjarstýrt sentrallás, spoilara aftan.



**NISSAN ECO T-100**
Árg des.1996, Km bert 35000. Kr. Nú: 79.000 + MVG – Sum nýggjur! Ger kvetti.



**MK606**
**CITROEN JUMPER**
Árg 37073, Km 123.000. Kr. 129.000 v/mvg – El-rútar, el-spegl, alufelgur. Høgur og rúmligur bilur, sera góður til arbeiðsbrúk.



**FORD MONDEO**
Árg 2001, Km 21.000. Kr. 225.000 – El-rútar, el-spegl, el-sóltak, fartpilot, air-conditon, radio v/6 fløgum. Sera snøggur bilur. Nývirði 330.000.



**VOLVO V40**
Árg 9. mai '03, Koksgráur, koyrt 24.000 km. Sera væl útgjørdur. Verður seldur fyri kunda. 250.000 kr.



**VOLVO 460, 1,8**
Árg sep. 95, Km 81.000. Kr. 75.000 – bl. Leðursetur, el-rútar, el-spegl, centrallás, hæddarstilling av førarasetri, hita í setrum. Sær gott út.



**MAZDA E2200 DIESEL**
Árg mai `97, Km 121.000. Kr. 79000 við MVG – Høgur. Sertilboð.



**VW PASSAT TDI**
Árg jan. 2002, Km 94.000. Kr. 229.000 – Automat gear, el-rútar, el-spegl, centralás, hæddarstilling av setrum framman.



**RENAULT MEGANE STATIONCAR**
Árg dec. 99, Km 115.000. Kr. 115.000 – El-rútar, el-spegl, el-sóltak



**VW GOLF 2,0 HIGHLINE**
Svartur, Árg juli 02, Km 39.700. Kr. 195.000 – Útgerð: t.d. sóltak, sportsetur, armlen, MP3 CD-spælara, el-rútar, infosentur og sportfelgur. Ein sera snøggur bilur



**SAAB 9-3 2.0**
Árg 29. juli 98, silvur, koyrt 71.000 km. Seinasta sýn sept. 03. Fyri kunda, 120.000 kr.



**OPEL ASTRA 1.8 STATIONCAR**
Árg okt. 95, Km 85.000. Kr. 76.000 El-spegl, centrallás, sportsetur. Í góðum standi. Kr 65.000 uttan bil í býti



**GOLF TURBO DIESEL**
Árg okt ´1995, Km 214.000. Kr. 84.000 – El-sóltak, Remus-tuningsútstoyt, hæddarstillað førarasetur, v.m. Nýsýnaður.



**VOLVO S40 2.0 AUT. GEAR**
Árg okt. 2000, Km einans 40.000. Kr. 178.000 – Fartpilot, air-condition, centrallás, el-rútar, el-spegl. Hita í setrum, hæddarstilling, alufelgur. Vetrardekk á alufelgum fylgja við. Verður seldur fyri kunda.

**RENAULT MÉGANE RXT 1,6**
Gráur, Árg des. 99, Km 104.000. Kr. 119.000 – Útgerð: t.d. sóltak. aircon., fjarstýrt sent.lás, el-rútar, el-spegl, hita í setrum og forrúti

VOLVO
RENAULT
BILAR
Hoyvíksvegur
tel 322110



# 100 ára býarmenning í Havn



*Sámal Tróndur Finnson Johansen frá Landskjalasavninum(v.m) og Erland Viberg Joensen eru høvuðsmenninir handan framsýning um 100 ára býarmenning í Havn, sum í hesum døgum er í Smiðjuni í Lítluvík*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Í Smiðjuni í Lítluvík letur upp í dag nýggj framsýning um býarmenning í Havn. Talan er um tíðarskeiðið 1856-1954. Tað er Landsskjalasavnið og Býarsavnið, ið skipa fyri**

FRAMSÝNING
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Í dag, leygardag, letur upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Tað er ein framsýning um býarmenning í Havn í tíðarskeiðnum 1856 - 1954.

Tað er Landsskjalasavnið og Býarsavnið, ið hava lagt framsýningina til rættis.

Tveir av høvuðsmonnunum handan framsýningina eru Sámal Tróndur Finnson Johansen og Erland Viberg Joensen. Teir hava fingið køna hjálp frá Finni Johansen.

## Býarvøkstur

– Tíðarskeiðið er valt út frá, at í 1856 fór bygginevndin, Thorshavns Bygningskommision, at virka, og í 1954 kom løgtingslógin um býarskipanir og byggisamtyktir í gildi.

– Vit royna við okkara framsýning at lýsa, hvussu býurin er vaksin og hevur ment seg ígjøgnum umleið 100 ár, siga teir báðir, Sámal Tróndur Finnson Johansen og Erland Viberg Joensen.

Framsýningin er sett saman av skjølum, myndum og kortum, sum eru savnað saman úr bygginevndini, Landsskjalasavninum og skjalasavninum hjá býráðnum. Elsta tilfarið er funnið á Landsskjalasavninum, og yngsta tilfarið er funnið fram á skjalasavninum hjá býráðnum.

## Fjølbroytt

Talan er um eina fjølbroytta framsýning, sum hevur nógvar áhugaverdar myndir, kort og skjøl.

Millum annað kann ein síggja eina býárætlan fyri Tórshavn frá 1867. Tá gongur Havnin bert niðan til Vaglið.

– Í 1867 varð ætlanin at gera eina regulering fyri býin. Húsini stóðu sum best bar til, og tí skuldi alt regulerast. Av tí, at bygginevndin ikki hevði ráð at gera arbeiðið sjálvt, varð bíðað, til fólk sjálvi skuldu byggja um. Tí varð ætlanin ongantíð rættiliga til nakað. Reguleringin vísir ein nýmótans leist at modernisera býin uppá, greiðir Sámal Tróndur frá.

Sjálvt hugskotið um framsýningina er umleið tríggjar mánaðir gamalt, og seinastu tíðina hava arbeiðsdagarnir verið rættiliga langir.

– Vit royna eisini at lýsa, hvussu býurin formar seg, tá vit koma inn í 20. øld, siga teir báðir.

Har kann millum annað síggjast eitt uppskot hjá HCW Tórgarð arkitekti um íbúðarhús íFøroyum.

## Beinar linjur

Fyrst í 20. øld komu tað, teir báðir kalla fyri »beinar linjur« inn í býarmyndina. Tað vil siga, at byrjað varð at leggja gøtur beint soleiðis, at tað gjørdist lættari at leggja kloakk- og vatnleiðingar.

Millum mongu tekningarnar er millum annað ein forvitnislig tekning um umsókn at byggja kiosk á Vaglinum.

Framsýningin letur upp í dag, leygardagin 24. juli og heldur fram til 1. august. Opið er allar dagar frá 14-20.

So tey, ið hava hug at síggja Havnina á ein øðrvísi hátt, kunnu leita sær oman í Smiðjuna á Lítluvík.

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg



*Gianfranco Contri kundi hósdagin errin vísa fram fyrstu føroysk-italsku orðabókina, sum hann sjálvur er høvuðsmaður fyri*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Fyrsta føroysk-italska orðabókin

**Út er komin fyrsta føroysk-italska orðabókin. Tað er italumaðurin Gianfranco Contri, sum hevur gjørt orðabókina í samstarvi við fleiri fólk**

ORÐABÓK
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Føroya Fróðskaparfelag gevur í samstarvi við Orðabókagrunnin nú út føroysk-italska orðabók. Talan er um eina orðabók, ið telur 14.850 leitiorð við týðingum og dømum. Hon telur tilsamans 636 síður.

Tað er italiumaðurin, Gianfranco Contri, sum seinastu 10 árini hevur sitið og arbeitt við orðabókini. Fyrstu ferð hann var í Føroyum var fyri góðum 20 árum síðani, og hevur hann síðan vitjað javnan til landið. Í 1995 kom hann aftur til Føroya at leggja lunnar undir orðabókina, sum í dag er veruleiki.

– Eg minnist, tá eg fyrstu ferð var í Føroyum. Tá fór eg inn í ein bókhandil og spurdi eftir eini føroysk-italskari orðabók, men hon var sjálvsagt ikki til, segði Gianfranco Contri á móttøku í Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya seinnapartin hósdagin.

Nógv fólk hava havt tilknýti til orðabókina, og tað sást eisini aftur á Føroyamálsdeildini hósdagin, tá loftið var fullsett.

## Ein dreymur

Endamálið við orðabókini er at geva fólki í Italia og Føroyum eitt amboð, sum tey kunnu brúka til at vita meira um mál og mentan hvør hjá øðrum.

Snotiliga orðabókin er í lummastødd, fyri at hon skal vera løtt hjá ferðandi at hava uppi á sær.

– Ein kann siga, at hetta er ein dreymur, sum er vorðin til veruleika, segði Gianfranco Contri á móttøkuni. Tosað var á italskum, føroyskum og enskum, so tryggjað var, at øll tey, ið tilstaðar vóru, skiltu, hvat gekk fyri seg.

Gianfranco Contri legði dent á, at tað vóru nógv fólk, ið hava verið sera týdningarmikil fyri at orðabókin kundi gerast veruleiki. Seinastu tíðina hevur hann havt sætið á Fróðskaparsetrinum, har hann hevur arbeitt við orðabókini.

Samstarvað hevur verið við Jógvan í Lon Jacobsen, Eyðun Ranváarson Jensen, Óla Mortensen, Galileo Ferraresi, Massimo Lazzerini og Heina Justinussen.

Tað er Ole Wich, ið hevur gjørt kápumyndina, og hann hevur annars eisini staðið fyri grafikkinum. Einars Prent hevur umbrotið, prentað og heft.

Føroysk-italska orðabókin kostar 320 krónur í bókhandlunum.